## Grindamenn hava aðalfund

Leygardagin hevur Grindamannafelagið aðalfund, og eisini verður kjak um grindafrámælið hjá landslæknanum. Leygardagin savnast grindamenn og onnur, sum hava við grindadráp at gera, í Norðurlandahúsinum í Havn. Dagurin byrjar klokkan 11 fyrrapartin, tá ið allir sýslumenn, grindaformenn og varamenn teirra eru bodnir til eina hugnaløtu og prát í Norðurlandahúsinum. Sjálvur aðalfundurin byrjar í Norðurlandahúsinum kl. 13.30. Fundurin er almennur. Aftan á aðalfundin verður pallborðsorðaskiftið um grindafrámælið hjá landslæknanum. Við pallborðið sita Pál Weihe. Jákup Petersen og Maria Dam. Grindamannafelagið hevur higartil hildið lágan profil í málinum um grindafrámæli, men nú ætlar felagið at taka eitt kjak um tað.



## Musikkandakt í Hoyvíkar kirkju

Eina ferð um mánaðin er musikkandakt í Hoyvíkar kirkju, har tónleikur er á skránni í umleið 25 minuttir. Síðan er stutt andakt. Mánakvøldið 30. mars klokkan 20.30 – 21 spælir »Strúkiorkestrið hjá Tórshavnar Musikkskúla« barokktónleik eftir m.a. Purcel og Handel. Leiðari er Bernhardur Wilkinson, og andaktina hevur Theodor Olsen, prestur. Musikkandaktin er hugsað sum ein friðarlig løta, har fólk eftir arbeiðsdagin kunnu savnast eina løtu í kirkjuni.

# oysk arbeiðsfólk um í øllum Evropa

tríggjar mánaðir á rað, skal lógin um evropiska arbeiðsmegi setast úr gildi aftur.

- Arbeiðsloysið er ikki 3,5% enn, men sannlíkt er, at tað verður tað nú í vár. Bara síðani ársskiftið er arbeiðsloysið meir enn tvífaldað, so tørvurin á útlendskari arbeiðsmegi er fullkomiliga burtur, sigur Ingeborg Vinther.

Í sambandi við útlendingalógina vildu fakfeløgini annars hava, at ein veruligur eftirlitsmyndugleiki skuldi setast á stovn, so at útlendingar bara sluppu inn í landið, um tørvur var á arbeiðsmegi. Feløgini vildu eisini, at allir útlendingar skuldu rinda prosentgjøld til fakfeløgini, so at feløgini eisini kunna fylgja við, at alt gongur regluliga fyri seg.

- Á henda hátt vóru útlendingarnir eisini partur av okkara tryggingum og eftirlønarskipan, segði forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

- Men hesi viðurskifti vórðu ikki tikin til eftirtektar, hóast vit fingu lyfti um annað, segði Ingeborg Vinther.

### Fleiri sløg

Tá ið hon tók samanum, vísti hon á, at úrslitið av øllum er, at í dag hava útlendingar framíhjárættindi til arbeiði í Føroyum, tí eftir lógini skal arbeiðsgevarin tryggja teimum 30 tíma og 40 tíma arbeiðsviku, meðan føroyingarnir verða sendir til hús, har lítið arbeiði er.

- Hetta er ikki nøktandi, og langt ífrá. Vit síggja eisini eitt vaksandi arbeiðsloysi.

Hon sigur, at í dag eru fleiri sløg av arbeiðsfólki á arbeiðsmarknaðinum.

- Føroyingar og norðurlendingar eru javntsettir. Útlendingar uttan fyri Evropa, sum eru komnir henda vegin at arbeiða, hava nærum somu rættindi sum norðurlendingar, umframt at teir hava trygd fyri 40 tíma arbeiðsviku og eru bundnir at einum arbeiðsgevara.

Útlendingar úr Evropa eru tryggjaðir 30 tíma arbeiðsviku og kunna skifta arbeiðsgevara, um teir hava tilboð um 30 tíma arbeiðsviku.



*- Fáa vit ikki skil á, noyðast vit at mæla frá, at Føroyar fara upp í nógv umrødda EBS samstarvið í Evropa, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Harmast um manglandi samstarv

SAMSTARV

*Áki Bertholdsen*
*aki@bertholdsen*

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, harmast um, at ikki fleiri fakfeløg hava áhuga fyri at vera við í Samtaki, sum er samstarv ímillum Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Fiskimannafelagið.

Tað gjørdi hon greitt í formansfrágreiðing síni á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun.

Hon segði, at Samtak hevur styrkt samstarvið millum feløgini og gjørt, at tey standa nógv sterkari og hava í størri mun kunnað sett dagsskránna.

- Harmiligt er, at ikki fleiri feløg hava víst áhuga at vera við. Eg hugsi serliga um hini arbeiðarafeløgini og handverkarafeløgini, men vónandi koma tey við, tí vit hava gott samstarv við feløgini, ið eru uttanfyri, segði Ingeborg Vinther.

Annars fegnast hon um, at samstarvið í Nordisk Union er sera gott.

- Tørvurin á norðurlendskum samstarvi gerst alsamt størri, so hvørt Evropa broytist, og ES verður víðkað til alt fleiri limalond, legði hon afturat.

Samstundis er fakfelagsrørslan í Norðurlondum nógv við í altjóða samstarvi, so ígjøgnum hetta samstarvið, røkka føroysku fakfeløgini víða.

Hon vísir annars á, at seinastu árini hevur sosial dumping farin fram í stóran mun, nú arbeiðsmegi úr láglønarlondum eystanfyri, ið eru vorðin limir í ES, er komin inn
í Norðurlond og Vesturevropa.

- Hetta hevur havt við sær ótrygg setanarviðurskifti, lága løn, langar arbeiðsdagar og nýtslu av vikarstovum. Tí kann sigast, at arbeiðsgevarar fremja tað, ið kann rópast ránsmannakapitalisma. Stríðið móti sosialari undirprísing er ikki eitt stríð móti útlendskari arbeiðsmegi, men eitt stríð fyri, at teir kollektivu sáttmálarnir, sum fakfeløgini hava strítt seg til í mong ár, skulu verða hildnir.

- Hetta stríðið er eisini nátt higar, og tí eiga vit øll at fylgja væl við, tá ið virki taka útlendska arbeiðsmegi inn, segði Ingeborg Vinther.